Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Kristianna Winther Poulsen, løgtingskvinna

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Krabbameinsætlan fyri Føroyar

Spurningar:

1. Hvussu stórur partur av tilmælunum í Krabbameinsætlanini fyri Føroyar frá 2022 eru sett í verk?

2. Hvør ætlan er fyri at seta restina av tilmælunum í verk?

3. Eru nøkur ávís tilmæli, sum eiga at fáa serliga høga raðfesting?

4. Hvussu er støðan hjá føroyingum, sum verða raktir av krabbameini, samanborið við støðuna hjá krabbameinsraktum í okkara grannalondum?

5. Hvussu eru møguleikarnir hjá starvsfólkunum á økinum at fáa førleikamenning og eftirútbúgving?

Viðmerkingar:
Krabbamein kann raka okkum øll. Tað gongur valla dagur, uttan at ófrættatíðindi hoyrast um, at fólk gerast sjúk. Okkurt tíðarskeið í lívinum rakar sjúkan okkum sjálvi, okkurt av okkara næstrafólki ella kenningar.

Ynskistøðan hevði verið at kunnað fyribyrgt, at fólk fáa krabbamein og gerast sjúk. Men sjúkan rakar, ofta hart og brutalt, og tey, ið verða rakt av sjúkuni, og teirra avvarðandi, skulu hava ta hjálp, teimum tørvar.

Í 2022 var krabbameinsætlan fyri Føroyar liðug. Hetta arbeiðið byggir á fyrstu krabbameinsætlanina, sum er frá 2009. Talan er um eitt stórt arbeiði, har nógv fólk við servitan og fjølbroyttum førleikum hava givið teirra íkast.

Nógv er hent á krabbameinsøkinum, síðani fyrsta krabbameinsætlanin varð gjørd í 2009. Størri vitan er um sjúkuna, og viðgerðarhættirnir eru blivnir betri, umframt at nýggir eru lagdir afturat. Harumframt er heilivágurin blivin betri. Tað hevur týdning, at starvsfólkini á økinum hava atgongd til neyðuga førleikamenning og eftirútbúgving.

69 tilmæli eru í krabbameinsætlanini, sum spennir víða. Hon fevnir um fyribyrging, hagtalsgrundarlag, screening, endurmenning, samskipaða sjúklingagongd og palliatión.

Nú eru trý ár liðin, síðani seinasta krabbameinsætlanin fyri Føroyar varð liðug. Spurningurin er, hvussu tað gongur við arbeiðinum at seta tey 69 tilmælini í verk, til frama fyri krabbarakt, teirra avvarðandi og fyri samfelagið sum heild.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýriskvinnuni í heilsumálum.

Á Løgtingi, 23. juni 2025

Kristianna Winther Poulsen